## Símun triðbestur í Íslandi



Morgunblaðið gevur eftir hvørt umfar stig til einstøku spælaraavrikini. Stigini verða latin sum "M", og higar til hevur Símun vunnið sær seks heil M í seks umførum. Og við hesum er hann ájavnur liðfelaganum Guðmundur Steinarsson, Pálmi Rafn Pálmason úr Vali og Tommy Nielsen úr FH. Tveir spælarar eru fremstir á listanum, og er annar teirra ein gamal kenningur hjá føroyskum fótbólti. Nevnliga Scott Ramsay, sum eitt skifti spældi fótbólt við GÍ, men sum nú spælir við Grindavík. Hann hevur vunnið sær átta M í seks dystum, og tað sama hevur Tryggvi Guðmundsson úr FH.

## Bæði á talvuna

Tá Russland í gjár minkaði um munin í dystinum móti Spania, var enn eitt petti av EM-søgu skrivað. Umframt at talan tá gjørdist um málríkasta dystin higar til í hesum endaspælinum, so var talan nevnliga eisini um fyrsta dystin, har bæði liðini komu á talvuna. Higar til hevur talan bert ta einu ferðina verið um mállevsan javnleik, men í øllum øðrum førum hevur altso annað liðið verið einsamalt um málskjótingina.

# David Villa í hopla

**Vandamikli Valencia-áleyparin vísti onga náði fyri Russlandi, og skoraði hattrikk í 4-1 sigrinum í gjár**



*Russiska bjørnin megnaði als ikki hava tamarhald á villa Villa, sum stóð fyri fyrsta hat-trick'inum hetta endaspælið*
*Mynd: Polfoto/AP*

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Spania fekk í gjár eina dreymabyrjan, tá ið teir vunnu heili 4-1 á Russlandi á Tivoli Neu leikvøllinum í Innsbrück. Russiska liðið var mannað við leikarum frá heimligu deildini, og hóast teir til tíðir vístu gott spæl, so var spanska liðið ov sterkt til teirra. David Villa skeyt reint hattrikk innan 75 min., áðrenn Roman Pavlyuchenko minkaði um munin til 3-1 í 86. minutti. Innskifti Cesc Fabregas staðfesti tó sigurin í yvirtíðini, tá ið hann skoraði til endaliga úrslitið, sum harvið gjørdist 4-1.

### Gav Torres málið

Eftir triðja málið rann David Villa beinleiðis út á spanska útskiftarabeinkin, har hann hálsfevndi útskifta Fernando Torres.

- Tað hevur verið nógv tosað um spælistílin hjá Torres, og um hann burdi verið við ella ikki. Hetta kjak hoyrir ongastaðni heima, og tí vildi eg tilætlað honum triðja málið. Hann átti jú eisini stóran lut í mínum báðum fyrstu málum, segði David Villa við spanska blaðið Marca eftir dystin.

### Umbiðin harri

David Villa hevur heilt frá sínum ungu árum verið ein málrevur, og sum 18 ára gamal fekk hann gjøgnumbrot í fulltíðar fótbólti. Fyrstu árini, sum hann leikti við "http://en.wikipedia.org/wiki/Sporting_de_Gij%C3%B3n"\o"Sporting de Gijón" Sporting de Gijón, gjørdi hann rættiliga um seg, og náddi at skora bæði 18 og 20 mál hvørt kappingarár, áðrenn hann skifti til Real Zaragoza við somu eydnu. Í 2005 keypti Valencia hann fyri góðar 80 mió. kr., og hetta hevur víst seg at verið eitt frálíkt innkeyp. Hann hevur skorað 58 mál í 101 dystum fyri Valencia, og hetta hevur skapt ein stóran eftirspurning eftir honum.

Tað er lítið sannlíkt, at hann verður verandi í Valencia eftir summarsteðgin, og Real Madrid, Barcelona og Chelsea hava øll verið áhugað í honum. Keldur vilja vera við, at hann longu hevur gjørt avtalu við Real Madrid, og hendan vil verða almannakunngjørd eftir EM.

- Lygn!" sigur forsetin í Valencia,"http://en.wikipedia.org/wiki/Agust%C3%ADn_Morera"\o"Agustín Morera" Agustin Morera, sum sigur seg vera fúsan til at halda á vandamikla áleyparan, sum við sínum 26 árum framvegis hevur framtíðina fyri sær.

# Zlatan skoraði

**Við sínum fyrsta landsliðsmáli í nærum trý ár sendi Zlatan Ibrahimovic Svøríki á sigurskós í dystinum móti Grikkalandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast málini hava restað í landsliðshøpi, so hevur Zlatan alla tíðina verið millum teirra, sum hava átt fast pláss á liðnum. Í øllum førum so leingi, sum hann ikki hevur verið fornermaður inn á landsliðsvenjaran.

Seinasta málið í gulum skoraði hann heilt aftur í oktober mánaði 2005, men í gjárkvøldið kom Zlatan so loksins aftur á talvuna. Og talan var um sanna perlu, har Zlatan fyrst bandaði við Henke, og so varð ein sonn kanónkúla send avstað við kós móti handara málhorni, har málverjin ongan sum helst møguleika hevði at verja fyri.

- Tað er stórt at vinna 2-0 í einum so truplum dysti. Tað er deiligt hjá liðnum at vinna, og ikki minni deiligt hjá mær at skora aftur. Nú skulu vit bara njóta hetta, áðrenn vit fara undir næstu uppgávuna, har vit mugu halda fram á sama hátt, segði Zlatan við svenska TV4 aftan á dystin.

Verjukenda spælið hjá verjandi meistarunum hevði annars leingi givið ábendingar um ein málleysan 0-0 dyst, men málið hjá Zlatan gjørdi so ein enda á hesum ætlanunum. Og tá Petter Hansson seks minuttir seinni skoraði eftir klossut grikst verjuspæl, var púrasta leyst og liðugt hjá svium, sum við hesum fingu eina góða byrjan upp á endaspælið.



*Fagnaðurin var øgiligur, tá Zlatan hevði bumbað sviar framum í dystinum móti verjandi meistarunum*
*Mynd: Polfoto/AP*

## EM-dystir

### Úrslit

**Spania-Russland 4-1 (2-0)**
1-0: David Villa, 20.
2-0: David Villa, 45.
3-0: David Villa, 75.
3-1: Roman Pavlochenko, 86.
4-1: Cesc Fabregas, 90.

Grikkaland-Svøríki 0-2 (0-0)
0-1: Zlatan Ibrahimovic, 67.
0-2: Petter Hansson, 73.

### Komandi dystirnir

**Bólkur A**

| **Dagur** | **Klokkan** | **Dystur** |
|---|---|---|
| 11.06 | 17.00 | Kekkia-Portugal |
| 11.06 | 19.45 | Sveis-Turkaland |

**Bólkur B**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | 17.00 | Kroatia-Týskland |
| 12.06 | 19.45 | Eysturríki-Pólland |